# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Føroysku oljufeløgini og framtíðin

Hóast tey eru ymisk, arbeiða við ymsum strategiium og í mangar mátar als ikki kunnu samanberast, hava mangir føroyingar tikið Atlants Kolvetni og Føroya Kolvetni til sín sum síni oljufeløg. Bæði eru tey við í leiting og framleiðslu.

Við jøvnum millumbilum frætta vit, hvussu gongur hjá feløgunum. Altjóða kreppan hevur sjálvandi eisini sett síni fingramerki á tilveru teirra.

Vit hava við áhuga fylgt AK, síðani tað gjørdist partur av stórum samtaki her heima til seinni at gerast framleiðari. Felagið mentist skjótt og gjørdist nærum hvørmansogn. Men lánibyrðan gjørdist so stór, at felagið rendi seg fast. Tá leiðsla og nevnd ikki megnaðu at endurfíggja lánini í útheiminum, kravdu føroysku fíggingarstovnarnir – fyri at átaka sær endurfíggingina – at broytingar vórðu gjørdar í nevnd. Úrslitið varð, at nevndarformaður og tveir nevndarlimir máttu fara frá. Og inn komu fólk við royndum innan altjóða fíggjar- og oljuheimin. Síðani vórðu 180 mill. kr. teknaðar í nýggjum partapeningi, harav meginparturin fór til at rinda niður skuld.

Eftir tað fylgdu hendingar, sum aftur skakaðu partaeigarar og almenning. Fyrst segði fíggjarstjórin upp, og harnæst varð forstjórin biðin um at fara.

Gamla felagið er ikki at kenna aftur. Og hóast broytingar er felagið framvegis er í tungum sjógvi. Ein meinbogi er, at tað er ikki væl fyri fíggjarliga ella við samstarvspartnarum. Lítið røkist fyri, at brunnur verður boraður í bræði, har AK er við.

Tað er lætt at hyggja í bakspeglið og fella dómar. Møguliga er tað so, at teir, sum hava havt valdið í felagnum, hava ikki dugað nóg væl at geara fyritøkuna til tey krøv, sum oljuvinnan setir til slíka fyritøku, eitt nú til professionell og roynd olju- og fíggjarfólk í nevnd og leiðslu. Tað var møguliga eisini eitt mistak, at tað ikki varð farið út eftir nýggjum partapeningi, tá tað gekk væl hjá felagnum. Og negativa úrslitið hevur so verið, at felagið megnaði ikki at vera eins virkið á oljumarknaðinum, sum henda vinna krevur.

Hitt oljufelagið, Føroya Kolvetni hevur eftir øllum at døma havt eina meira hepna hond við sínum virksemi og hevur dugað betur at gerast partur av áhugaverdum loyvum.

Skuldi tað hent, at AK ikki megnar at fáa lut í boringum saman við størri oljuføløgum, kann tað lættliga koyra seg fast. Og tað vil vera ein vanlukka fyri føroyska samfelagið, tí so nógvar fyritøkur og einstaklingar hava sett nógvan pening í felagið.

Vit kunnu bara vóna, at nýggja nevndin fær skútuna aftur á beint, men verða brotasjógvarnir ov stórir er lítið annað at gera enn at leggja saman við annað oljufelag. Ein møguleiki, sum nýggi nevndarformaðurin í AK ikki hevur útilokað er at leggja saman við hinum føroyska oljufelagnum. Sum uttanfyristandandi eygleiðarar meta vit, at tað kann vera, at hesi feløg høvdu passað saman sum fótur í hosu í eini samanlegging. Har AK hevur megnað væl at fingið framleiðslu í hús, hevur FK megnað at fingið leitibrunnar uttan at gjalda nógv fyri teir. So mugu oljuserfrøðingarnir hjá feløgunum meta, um slík samanlegging er skilagóð fyri báðar partar.

**Sosialurin**

## Presse- og ytringsfriheten på Island under press

Journalistforbundene i Finland, Sverige, Danmark og Norge slår alarm om angrep på presse- og ytringsfriheten på Island.

Etter finansskandalene og krakket i den islandske økonomien, er det særdeles viktig at de islandske mediene er i stand til å bevare sin frie og uavhengige stilling. Mediene må være fullt i stand til å informere folket om hva som har skjedd, og hva som gjøres av de som sitter ved makten, politisk og i finansverdenen.

Utviklingen i islandske medier er derfor spesielt urovekkende. En stor andel av journalistene har mistet jobben på grunn av nedskjäringer og konkurser. Samtidig ser vi en rekke tilfeller der journalister med lang erfaring blir sparket uten forvarsel. På denne måten forstummer formidling av viktige, kritiske stemmer.

Spesielt alvorlig er situasjonen i Islands eldste avis Morgenbladet. Her har eierne ansatt landets tidligere statsminister, sentralbanksjef da Islands økonomi brøt sammen som sjefredaktør – samtidig som han er under gransking for sin rolle i den ökonomiske krisen.

Journalistforbundene i Norden ser med stor bekymring på behandlingen som ledende tillitsvalgte i det islandske forbundet blir utsatt for. Både nåværende og den nylig avgåtte lederen for forbundet, samt ett av styremedlemmene, er i løpet av kort tid sparket fra sine jobber, utenom varslet nedbemanning. I tillegg er det alvorlig at disse tillitsvalgte blir forsøkt ilagt munnkurv av redaktører og beskyldes for å ha skjulte agendaer, når de står opp for å beskytte sine kolleger.

I Norden har vi alle et ansvar for å si tydelig fra når presse- og ytringsfriheten settes alvorlig på prøve i et av våre naboland. Derfor vil Nordisk Journalistforbund i samarbeid med det islandske journalistforundet i närmeste framtid arrangere en konferanse på Island for å sette sökelys på og diskutere ytringsfrihet og mediestötteordninger i Norden.

***Dansk Journalistforbund***
**Mogens Blicher Bjerregaard**

***Svenska Journalistförbundet***
**Agneta Lindblom Hulthen**

***Finlands Journalistförbund***
**Arto Nieminen**

***Norsk Journalistlag***
**Elin Floberghagen**

## Løgmaður lovar fólkaatkvøðu um loysing

TÍÐINDASKRIV

*Landsnevnd Unga Tjóðveldisins*

Hesi vóru orðini hjá løgmanni á sjónbandsupptøku, ið var víst í sambandi við almannakunngeringina av konseptinum Support Faroese Indepence (SFI)15. mai 2009 í Reinsaríum í Havn. Lyftið hjá løgmanni var, at um vit megnaðu at útvega 50.000 undirskriftir, so skuldi hann útskriva fólkaatkvøðu um loysing (ella samband). Herferðin at savna undirskriftir er byrjað!

Unga Tjóðveldið saman við Peturi Pólson skapti hetta konsept fyri at menna kjakið um loysing til at vera viðkomandi fyri hvørt einstakt menniskja, sum býr í Føroyum. Hugskotið handan SFI er, at eingin einstaklingur ella tjóð skal geva seg undir nakran hægri myndugleika, men heldur søkja frælsi - bæði mentalt og praktiskt.

Kjakið um frælsi hevur ongantíð verið so viðkomandi sum nú, vit sita við einum málleysum løgmanni og einari visjónsleysari samgongu. Eisini hevur fíggjarkreppan víst okkum, hvussu lítið hitt einstaka menniskjað er vert, og hvussu bankaverðin sær okkum sum neyt, ið skulu brúkast fyri at skapa profitt. Tað er umráðandi í einum tílikum altjóða og heimligum politiskum anda at minnast frælsi hins einstaka.

Slagorðið hjá SFI er “alter the states of the mind”. Hetta skal skiljast, sum at vit skulu broyta sinnisstøðu okkara og sleppa okkum av við trælalyndið, men samstundis eisini, at vit skulu broyta okkara støðu til, hvørjar tjóðir (ella hvørjir “statir”) eru til. Hetta orðaspæl lýsir best okkara ríkisrættarligu støðu, sum er ein samantvinning av trælyndi hins einstaka og tjóðarloysi lands okkara.

Í sambandi við SFI hevur Unga Tjóðveldið saman við Peturi Pólson ferðast runt landið og hildið SFI tiltøk. Á hesum tiltøkum hava røður, kjak og tónleikur verið á skránni. Vit hava verið í Gøtu, á Giljanesi, á Tvøroyri og í Klaksvík. Nú ætla vit so at hava tað største SFI tiltakið í Tórshavn. Hetta eitur SFI Tórshavn og verður í Perluni fríggjakvøldið 4. des. kl. 20.

Á skránni verður tónleikur við Tróndi Enni og Onion Tree og røður frá Bergtóru Høgnadóttur Joensen, tinglimi, Peturi Pólson, listamanni og Bjarna Husgaard Niclasen úr Unga Tjóðveldinum.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.